umhvørvisstovan

# Umhvørvisgóðkenning

av

**betongblandistøð hjá Sp/f Norcon**

| Navn á virki við góðkenning: | |
|---|---|
| **Sp/f Norcon** | |
| Bústaður hjá virki: | |
| **Á Oyrunum 8, 900 Vágur** | |
| Galdandi fyri virksemi: | |
| **Goymsla, blanding og útkoyring av betongi** | |
| Matr. nr.: | V-tal |
| 596a | 613126 |
| Mál nr.: | Galdandi frá: |
| 17/00688 | 19.04.2017 |

Dagfesting, Argir hin 19.04.2018

Suni Petersen, deildarleiðari

/

Vivie Kirke Davidsen,
umhvørvisviðgeri

# 1 Góðkenning og heimildir

Henda umhvørvisgóðkenning av betongblandistøðini hjá Sp/f Norcon, matr. nr. 596a í Vági, er givin við heimild í § 29 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, seinast broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, og § 1, nr. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, sum broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007.

# 2 Umsókn

Umhvørvisstovan fekk hin 15.02.2018 umsókn um umhvørvisgóðkenning frá sp/f Norcon í Vági, betongsblandistøð (málnr. 17-00688-10). Talan er um virksemi á matrikul nr. 596a í Vágs kommunu. Vágs kommuna er eigari av matriklinum.
Umhvørvisstovan hevur eisini móttikið tekningar, sum vísa innrætting, framleiðslu og botnfellingarbrunn og spillivatnsleiðingar. Móttikna tilfarið hevur saman við vitjan á staðnum og samskifti, verið grundarlag undir viðgerðini av umsókníni.

# 3 Endamál

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi, og ampar sum kunnu standast av virkseminum.

# 4 Lýsing av virkinum

Virkið er á matr. nr. 596a í Vági, sum er ogn hjá Vágs kommunu. Virkið liggur í økið D2 eftir byggisamtyktini, sum er havna- og ídnaðarøki.

Framleiðslan av betongi fer fram á tann hátt, at sement, sandur, skervur og møgulig tilsetingarevni, so sum luftíblandievni og plastifiseringsevni, og vatn verða blandað í eini lukkaðari skipan á blandistøðini. Síðani verður betongið koyrt í betongbili út til kundan. Metta árliga vatnnýtslan er áleið 100.000L. Sement verður móttikið og goymt í sementsilo. Framleiðslan verður ikki mett at fara upp um 2000 m3 pr. ár.

Virksemið fevnir um:

- Blanding og útkoyring av betongi umframt goymsla av sementi, sandi og skervi.
- Vasking av betongbilum.
- Goymslu av rávørum.

Virkið fer at hava ein stóran botnfellingarbrunn, sum spillivatn verður leitt í. Botnfellingarbrunnurin verður 80 m3 til støddar, við trimum kømurum. Sýnistøkubrunnur verður

á útleiðingini, og útleiðingin verður leidd út 1 metur undir lægstu fjøru. Útleiðingin fær í fyrstu atløgu undantak frá kravinum í spillivatnskunngerðini, um at útleiðingin ikki kann leggjast innanfyri molar. Sí treytirnar fyri spillivatn undir punkt 6.

# 5 Viðgerð

Undir viðgerðini er serligur dentur lagdur á spillivatnsútleiðing, dust útleiðing og goymslu av rávørum.

Framleiðsla av betongi hevur við sær útleiðing av sementdusti og spillivatni frá framleiðslu av betongi og vaski av betongbilum.

Spillivatn frá vaskiplássinum til betongbilar skal leiðast í botnfellingarbrunn. Um spillivatnið inniheldur olju, skal tað leiðast gjøgnum ein rætt dimensjoneraðan oljuskiljara og víðari í kommunala ella privata spillivatnsútleiðing, sum lógliga førir spillvatni á sjógv. Sí treytir 6.2.6-6.2.8.
Uppskot til umhvørvisgóðkenning varð hin 21.03.2018 sent til Norcon og Vágs kommunu til hoyringar. Ongar viðmerkingar vóru.

# 6 Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er givin við niðanfyri nevndu treytum.

## 6.1 Almennar treytir

6.1.1 Henda umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð finnast á virkinum, og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og krøvini í góðkenningini. Góðkenningin er galdandi fyri alt arbeiði sum verður gjørt í samband við virksemi.

6.1.2 Allar sýnistøkur og kanningar v.m., sum verða kravdar í umhvørvisgóðkenningini, skulu gerast av óheftum stovni ella felag, sum hevur førleika og útgerð at gera arbeiðini.

6.1.3 Sp/f Norcon rindar fyri allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum.

6.1.4 Virksemið má ikki broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á nakran hátt uttan at søkt verður um nýggja góðkenning. Harafturat skal navnabroyting og/ella eigaraskifti fráboðast Umhvørvisstovuni.

6.1.5 Um virksemið steðgar fyribils, skal tilfar og útgerð uttandura antin tryggjast soleiðis, at tey ikki eru til ampa fyri umhvørvið ella beinast burtur. Harafturat skal eigari tryggja at

olja, kemikalii ella annað ikki kunnu verða til ampa ella kunna dálka umhvørvið meðan virkið liggur stilt.

6.1.6 Heldur virksemið uppat, skal Umhvørvisstovan hava boð um hetta í minsta lagi tríggjar mánaðir frammanundan at virksemið steðgar, við eini ætlan um, hvussu virkið verður riggað av.

6.1.7 Umhvørvisstovan hevur eftirlit við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

6.1.8 Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóg.

6.1.9 Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin kunnu ikki gevast onnur boð ella forboð enn ásett eftir hesi góðkenning, uttan so at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarskaðaárin.
- dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin.
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

6.1.10 Tá ið meira enn 5 ár eru gingin eftir at góðkenningin er lýst, kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í góðkenningini, tá ið tað er umhvørvisæliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni framleiðsluhættir eru komnir fram.

## 6.2 Spillivatn

6.2.1 Tætt undirlag skal vera á økinum har betongframleiðslan og vask av bilum fer fram. má ikki verða sjónlig dálking ella upphópan av betongið at síggja við munnan á spillivatnsútleiðingini.

6.2.2 Um spillivatn førir til upphópan ella sjónliga slóð í sjónum, skal reinsing av spillivatninum betrast. Um neyðugt kann Umhvørvisstovan krevja, at spillivatnsútleiðingin verður løgd út um molan.

6.2.3 Botnfellingarbrunnurin skal tømast eftir tørvi. Um botnfallið ikki verður endurnýtt, skal tað avvatnast og latast góðkendum móttakara.

6.2.4 Vatn frá vaski av bilum skal leiðast í reinsiskipan, sum tryggjar at betongslam og møgulig olja ikki verður leitt út.

6.2.5 Restir av blandaðum betongi skal goymast á hóskandi staði, áðrenn tað verður endurnýtt ella latið góðkendum móttakara.

6.2.6 Reingerðarevni ið verða nýtt til vask av bilum, skulu vera skjótt separerandi reingerðarevni, soleiðis at møgulig olja kann haldast aftur.

6.2.7 Sýni skulu takast av spillivatninum, ið verður leitt út. Sýnini skulu takast úr sýnistøkubrunni eftir reinsiskipanina meðan virkið er í fullum rakstri. Sýnini skulu

takast hálvárliga í 3 ár. Hereftir verður støða tikin til um framhaldandi kanningar skulu gerast.

6.2.8 Spillivatnið skal kannast fyri:

- Olju (mineral)
- Suspenderað evni
- Botnfelliligt evni

Og skal lúka niðanfyristandandi markvirðir:

- Olja 10 mg/L
- Suspendera evni 300 mg/L
- Botnfelliligt evni 10 mg/L

6.2.9 Um markvirðini ikki verða yvirhildin, skal spillivatnið reinsast í hóskandi reinsiskipan.

## 6.3 Útlát til luft

6.3.1 Á sementsilo skal vera filtur, sum loyvir í mesta lagi 25 mg av dusti pr. $m^3$ av luft.
6.3.2 Umhvørvisstovan kann krevja at sýni verða tikin av luftútleiðingini á sementsiloini.

## 6.4 Óhapp

6.4.1 Um dálking kemur fyri vegna óhapp[1] skulu beinanvegin setast í verk tiltøk til at avmarka avleiðingarnar.
6.4.2 Óhapp, sum hava ella kunnu hava umhvørvisligan týdning, skulu skjótast gjørligt fráboðast Umhvørvisstovuni. Eisini skal frágreiðing um orsøk og møgulig tiltøk v.m. sendast Umhvørvisstovuni.
6.4.3 Har vandi er fyri spilli av kemikalium, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

## 6.5 Burturkast

6.5.1 Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi reglur um burturkast[2], og skal latast til góðkendan móttakara.

6.5.2 Burturkast skal goymast í íløtum ella bingjum, sum eru egnað til endamálið, og skal standa soleiðis, at tað ikki elvir til dálking ella er til ampa.

6.5.3 Burturkast skal regluliga latast góðkendum móttakara, soleiðis at goymslurnar ikki gerast ov stórar.

---

[1] Dálkingaróhapp skulu eisini fráboðast til Løgregluna (dálking á landi) ella til Sjóbjargingarstøðina, MRCC-Tórshavn (dálking á sjónum).
[2] Kunngerð nr. 147 frá 19. okt. 1995 um burturkast, broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. sept. 2007

## 6.6 Óljóð

6.6.1 Ískoytið til óljóð[3] frá virkseminum má ikki fara upp um virðini í talvu 1.

Talva 1: Markvirði fyri óljóð - dB(A)

| | **Mán – frí kl. 07 - 18<br>leyg. Kl. 07 - 14** | **Mán – frí kl. 18 - 22<br>leyg. kl. 14 - 22<br>sunnu -/ halgidg 7-22** | **Allar dagar<br>kl. 22 - 07** |
|---|---|---|---|
| **Øki 1:<br>Vinnuøki, har larmandi virksemi kann fara fram** | 70 dB | 70 dB | 70 dB |
| **Øki 2:<br>Vinnuøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram** | 60 dB | 60 dB | 60 dB |
| **Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarøki** | 55 dB | 45 dB | 40 dB |
| **Øki 4: Bústaðarøki** | 45 dB | 40 dB | 35 dB |

*Markvirðini, sum eru sett í talvu 1, vísa, at um ein er staddur í t.d. økið 4, sum er bústaðarøki, millum kl. 22 - 07, er mest loyvda ískoytið til óljóð frá virkseminum 35 dB.*

6.6.2 Um ampar verða av óljóði frá virkseminum, kann Umhvørvisstovan krevja óljóðsmátingar gjørdar, tó í mesta lagi einaferð um árið.

## 6.7 Rakstrarskrásetingar

6.7.1 Virkið skal gera árliga umhvørvisfrágreiðing við uppgerð av rakstrarskrásetingum, frágreiðing um umhvørvisviðurskifti herundir møgulig óhapp, gjørd og ætla umhvørvistiltøk, eftirlit við reinsiskipanum, tøming av brunnum o.a. og senda hana til Umhvørvisstovuna í seinasta lagi 1. februar í avloysandi árinum.

6.7.2 Virkið skal skráseta nøgdir av:

- Burturkasti
- Sementi
- Sandi
- Skervi
- Vatni
- Reinsing av reinsiskipan (dagfesting)

[3] Ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðsstøðið í dB(A) í viðkomandi økjum sambært kommunalu byggisamtyktini.

- Óhapp (frágreiðing um hvat er hent og hvussu bøtt var fyri umhvørvisdálking)

# 7 Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðani sendir hana til Innlendismálaráðið saman við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

**Avrit:** Vágs kommuna, Vágsvegur 30, FO-900 Vágur
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postboks 9, FO-110 Tórshavn